## Føroysk útgáva av Call on me

Eitt ótal av filmsklippum liggur á Youtube, og eitt alsamt vaksandi tal av hesum tilfari er føroyskt. Eitt av teimum stuttligaru innsløgunum, er eitt føroyskt sjónbandalag til Call on me.

Sjónbandalagið, ið vísir ungar føroyskar menn í eggjandi aerobocis dansi í eini parodi uppá upprunaliga videolagið, har ungar damur gera tað sama. Sjónbandalagið er tikið upp í fimleikarhøllini í Studentaskúlanum, og hevur heitið Ítróttartímin.

Sjónbandalagið liggur á hesi slóðini: *youtube.com/watch?v=GgCdnbJCqRQ*



*Mynd: skermprent*

# Lena Anderssen á Spot Festivalinum

**Lena Andersen verður partur av verkætlanini Nordic Cowriters. Hon skal í vikuni áðrenn Spot Festivalin at skriva nýggjan tónleik saman við øðrum sangskrivarum og framføra nýggju løgini á sjálvum festivalinum**

FESTIVAL SUMMARIÐ
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Spot festivalurin í Århus er ein tann týdningarmiklasti ídnaðarfestivalurin í Norðurlondum. Í fjør luttóku fleiri føroysk nøvn, nú er greitt at aftur í ár verða Føroyar umboðaðar, Lena Anderssen er komin á skránna.

Spot festivalurin hevur leingi givið singer/songwriter tónleikagreinini gott pláss á festivalinum. Teitur er eitt av nøvnunum, ið festivalurin hevur hjálpt fram innan hesa grein.

Innan fyri karmarnar á Spot festivalinum verður skipað fyri verkætlanini Nordic Cowriters, her skulu 12 tónlistafólk í pørum um at skriva sangir saman í vikuni áðrenn festivalin verður, á einum staði har tey ikki verða órógvað av umheiminum. Úrslitið av hesum samstørvum verður síðan framført á festivalinum. Í fjør luttók Høgni Lisberg á hesi verkætlan.

Í ár vera umframt Lenu, danirnir Helgi Jonsson, CS Nielsen, Jimmi Andersen, Sara Grabow, Kajsa Vala og Mads Langer, grønlendski Angu Motzfeldt, norsku Marte Wulff og Thom Hell og svenska Josefina Sanner.



*Lena Andersen er fyribils einasta føroyska umboðanin á Spot Festivalinum, har føroyingar nærum duttu um hvør annan í fjør*

*Mynd: Bárður Eklund*

# Íslendskur áhugi í føroyskum kynslívi

**Prát um kynslív á kvinna.fo hevur vakt ans í Íslandi. Somikið nógvir íslendingar hava vitjað heimasíðuna, at talið av vitjandi í næst seinastu viku vaks við 95,5% sambært gallup.fo**




Íslendska heimasíðan b2.is, ið er eitt slag av leinkjusavni til stuttligar ella áhugaverdar heimasíður, við øðrum orðum ein íslendsk útgáva av nym.fo, hevur lagt leinkju á heimasíðu sína, til eitt kjak á kvinna.fo, har føroyskar kvinnur undir evnisheitinum “Tað aftara holið” kjakast um anal sex. Hetta kjakevnið er eftir øllum at døma sera áhugavert fyri íslendingar, tí sambært tølunum á vevmátingarlistanum hjá Gallup var talið av vitjandi á kvinna.fo í næst seinastu viku farið upp við 95,5%. Her av er lutfallið 69,2 útlendskir ip-bústaðir og 30,8% føroyskir. Til samanberingar kann sigast, at lutfallið vikuna fyri var 28,4 % útlendskir ip-bústaðir og 71,6% føroyskir.

Tað er sostatt ikki einans á tónleikaøkinum, at føroyingar hava gjørt vart við seg í Íslandi seinastu vikurnar.

niels uni

